DAGSINS MEINING

Løgtingsins umboðsmaður

Vit hava tosað um at fingið ein løgtingsins umboðsmann í 20 ár, og hava nú endiliga fingið hann. Tað er ongantíð so neyðugt sum nú, at hava ein umboðsmann, ið er óheftur av miðfyrisitingini. Vit hava fyrr á hesum stað gjørt vart við, at hvørja ferð onkur setir spurning við mannagongdir ella avgerðir hjá miðfyrisitingini, so sleppur miðfyrisitingin at kann seg sjálva.

Ikki heilt óvæntað, so plagar miðfyrisitingin ikki at finna so nógvar feilir við sær sjálvum.

Nú var so dømi um eitt mál, har ein løntakari hjá tí almenna hevði kært eina avgerð hjá Lønardeildini til Løgtingsins Umboðsmann. Niðurstøðan gekk Lønardeildini ímóti, og so skuldi málið verið avgreitt – ella hvat? Deildarstjórin í lønardeildini kom so við tí heilt ótrúliga úttalilsinum, at tað kundi verða, at niðurstøðan hjá umboðsmanninum bleiv fylgd, og tað kundi eisini verða, at hon ikki bleiv fylgd. Tað undirgrevur virðið á umboðsmanninum, um miðfyristingin, ið annars plagar at kanna seg sjálva, ikki fylgir hansara niðurstøðum.

Hetta er sera álvarsligt. Vit hava fyrr á hesum stað sett spurnatekin við leiklutin hjá Lønardeildini, og mugu nú ásanna, at verri er statt, enn vit hildu.

Um ein alment løntur er misnøgdur við eina avgerð hjá lønardeildini, hvat kann hann so gera? Hann kann altíð fara í rættin, men tað kann ikki vera rætt, at ein meinigur maður skal brúka nógva tíð og nógvar pengar fyri at fáa tað, ið viðkomandi hevur rætt til. Tað verður altíð tann lítli ímóti »systeminum«, og setast nógv fólk aftur, um tey noyðast í sakarmál. Nú fingu vit so løgtingsins umboðsmann, og var hetta eitt kærkomið høvi at fáa onkran uttanfyristandandi at fara til um almennar avgerðir. Serliga havandi í huga, at miðfyrisitingin hevur verið upphavið til fleiri ivasom mál seinastu 4 árini – tað kunnu vit bara spyrja Helenu Dam á Neystabø um.

Tað er alneyðugt, at Landstýrismaðurin setur sína umsiting uppá pláss. Ein avgerð hjá Løgtingsins Umboðsmanni eigur at verða fylgd av miðfyrisitingini uttan nakra diskussión.

Fagrir faldarar um starvsfólkapolitikk nytta einki, um tann alment løntí noyðist at fara í rættin fyri at fáa tær sømdir, hann hevur krav uppá. Løgmansskrivstovan og Lønardeilidin kunnu ikki arbeiða tvørt av hvørjum ødrum, og eigur hetta mál at fáa avleiðingar, tí tað er rættiliga prinsipielt. Trivnaður á einum almennum arbeiðsplássi verður ikki tryggjaður, um rættindini hja tí einstaka verða traðkaði av »systeminum«.

Sleppur miðfyrisitingin í hesum málinum undan at fylgja umboðsmanninum, so eigur Løgtingsins umboðsmaður antin at verða avtikin, ella má skipanin broytast, so at hansara avgerðir verða bindandi.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ein øvundarmaður

Dan R. Petersen
javnaðarmaður

Tað var ein heldur sjaldsom jólaheilsan, Bill Justinussen, umboð fyri ta lokalpolitisku sektina, Miðflokkin, hevði í bløðunum 21. desember.

Hóast valevni til fleiri løgtingsval so tykist Bill ikki at skilja, hvør uppgávan hjá einum løgtingsmanni er. Mínar atkvøður sløðast um alt valdømið, og eg kenni skyldu fyri allari oynni og eri lóggevari fyri alt landið. Og soleiðis meti eg, at teir flestu tingmenn hava tað. Tað kennist undarligt at verða skuldsettur fyri at vera ímóti Skálafjørðinum, har eg havi livað míni flestu ár, og har stórt sað øll mín familja býr.

Tað tykist eisini løgið, at Bill av øllum skal halda seg til at leggja øðrum lag á, hvussu stillast skal upp. Veljarin er ikki soleiðis at reka í rætt, tað veit Bill betur enn nakar annar. Í seks av sjey valdømum er hansara flokkur als ikki umboðaður, og hansara persónligu atkvøðutøl eru av slíkum slag, at eg als ikki vil seta tey á prent.

Men boðini eru greið: Nú gongst so væl hjá Runavíkini, at tingmenn aðrastaðni frá skulu flytast til kommununa, sum vóru teir almennir stovnar so sum sýsluskrivstova, gjaldstova ella apotek.

Jú, tað gongur væl á Skálafjørðinum, og tað gleðast øll um. Men Fuglafjørður smæðist sanniliga ikki burtur. Eg hugsi ikki, eg fari skeivur, tá eg sigi, at Fuglafjørður í mun til fólkatalið er størsta vinnulívsbygd í landinum. Men um øvundarmaðurin, Bill fegnast um tað, man vera ivasamt.

Hvussu aðrir stilla upp, má vera teirra sak. Vit í okkara flokki hava haft eina fasta skipan við einum valevni í hvørjari av teim størstu kommununum. So har er ongin taktikkur móti nøkrum. Síðan 1936 hevur Eysturoyggin haft javnaðarumboð á tingi burtursæð frá einum valskeiði. So sigast má, at vit hava haft ein trúgvan og stabilan veljaraskara. Men vit hava ikki haft nakra ávísa háborg sum t.d. sambandsflokkurin á Toftum. Tí hevur javnaðartingmaðurin skift millum bygdir, hvørja ferð tann gamli hevur lagt frá sær. Okkara fyrsti tingmaður Hans Jacob Poulsen búði á Eiði. Eftirmaður hansara Joen Símun Heinesen búði á Leirvík. So kom tann legendariski Jákup Frederik Øregaard, ið sat á tingi í 38 ár. Hann var leirvíkingur og búði í Gøtu. Eftir hann kom Jørgen Thomsen, gøtumaður búsitandi á Skála. Og í løtuni er tað undirritaði, saltnesmaður búsitandi í Fuglafirði til Bill's mikla trega, sum havi tann heiður at umboða javnaðarflokkin í Eysturoynni.

Hvat sigur Tordur Niclassen, nú partamaðurin setir ein atkvøðumúr runt Skálafjørðin? Hetta er eisini eitt praj um ikki at velja Tord.

At summir hava eitt lærarakompleks, havi eg onki problem av. Tað hevur óiva sínar orsøkir, sum alt annað her í lívinum. Okkurt skisma, sum ulmar í sálardýpinum.

Viðmerkingin hjá Bill er ætlað at seta ilt blóð millum økir, ið arbeiða væl saman. Tí er tað vamlisligt at lesa endan, har hann skoytir lívsvirðir, mentan og tað kristna lívssýnið uppí. Hykl! Annars lystir meg at síggja tann fuglfirðing, ið er hugaður at standa á lista við Bill Justinussen.

Rættleiðing til Eyðólv Dimon

Asbjørn Lómaklett,
skúlastjóri

– um teldufrálæru í Klaksvíkar Kommunu.

Mær varð gjørt vart við, at Eyðólvur Dimon hevði skrivað í Sosialin nr. 3 – 2002, at meðan »summi høvdu fingið teldur inn í skúlan fyri 15 árum síðani, so hevði Klaksvíkar Skúlaverk ikki framt sama tiltak fyrr enn í fjør«.

Klaksvíkin skuldi tí vera »gott dømi« um, at tað ikki er rætt at leggja skúlaumsitingingina út til kommununar.

Nú veit eg ikki, hvar Eyðólvur hevur fingið sínar upplýsingar í hesum máli, men tær eru alt annað enn beinar, ja, tær eru heilt burturvið og beinleiðis ósannindi.

Tað sanna er: Klaksvíkar Skúlaverk byrjaði longu í seinnu helvt av 1970 – árunum, eg haldi, at tað var í 1978 at bjóða regluliga teldufrálæru í framhaldsdeildini. Lagt varð fyri við ABC-80 teldum, men so við og við vóru nýggjar teldur keyptar, sum tørvur var á. Serlig teldustova var tøk við eini 12 – 15 teldum, og øktist talið spakuliga við árunum.

Sostatt vóru vit ikki í nakrari trongstøðu viðv. teldufrálæru, tá Mentamálastýrið gjørdi reglur um teldukeyp til allar skúlar við almennum stuðli frá 30. nov. 1998.

Vit kundu sjálvandi verið millum tey fyrstu, ið keyptu teldur sambært nevndu lóg frá 20. juni 1997, men tað eigur at vera havt í huga, at kommunan her var júst um tað mundið farin undir at fyrireika stórar ábøtur á skúlabygningarnar, og hevur hon síðani tá nýtt u.l. 10 mill. kr. til hetta endamálið hesi árini og ætlar at nýta ca. 3 mill. kr. í inniv. fíggjarári til framhaldandi endurnýggingar, men vit keyptu so teldur í fjør (2000) sambært studningslógini, men hesar vóru als ikki tær fyrstu, um Eyðólvur sigur, men bert framhald av tí arbeiði, ið byrjaði longu fyri gott og væl 20 árum síðani.

Gott hugskot at lata kommunurnar yvirtaka skúlarnar

Tað er sera gott hugskot av

framhald á síðu 11

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

framhald av síðu 10

landsstýrinum at lata kommununnar yvirtaka fólkaskúlarnar, og eru fleiri orsøkir til tess.

Nýggja skúlalógin leggur øll, sum hon er upp til, at foreldrini skulu meira inn í myndina viðvíkjandi øllum. ið fer fram innan skúlagott (skúlastýrini).

Tað er tí bert natúrligt framhald av galdandi skúlaskipan, at kommununar nú fara at taka sær av fólkaskúlanum.

Allir partar, sum hava átikið sær leiðsluábyrgd – formliga ella ikki – hava ábyrgd av at finna ta gongdu leiðina og at ganga hana í praksis. Formliga leiðslan verður í hesum sambandi sett á ein royndarbonk, har bert tann búni stendur mát.

Var Landssjúkrahúsið ein stakur trupulleiki í føroyska almenna sektorinum, so var helst ikki so trupult at finna eina gongda leið.

Men so er ikki.

Aðrir trupulleikar í almenna sektorinum

Politikkarar eru gyrdir í brøkur av trupulleikum, sum vísa seg alla staðni í tí almenna sektorinum við nøkrum heilt fáum undantøkum. Vit skulu ikki minnast so langt aftur, so kunnu vit nevna Læraraskúlan, Almannastovuna, pensjónsmálið, Trøllanes-málið, Skúlan á Trøðni, Fólkaskúlan, Landsverkfrøðingin, Kunningardiskin í Vágum, Postverkið, telefonverkini, Strandferðsluna, innkrevjingardeildina hjá Toll- & Skattstovu landsins, tekniska skúla í Havn o.s.fr.

Og so alt tað, sum vit ongantíð hoyra beinleiðis, men sum fyri mong er lætt at lesa av, táið ein hoyrir eitthvørt frágreitt í fjølmiðlunum. Umframt alt tað, sum vit hoyra vinir og kenningar kæra sína neyð um.

Í øllum hesum meldrinum skulu starvsfólkini brúka stóran part av lívi sínum. Eini 6.000 í tali!

Væl tey flestu starvsfólkini velja at tiga. Av góðum grundum.

Nøkur fá starvsfólk kenna sínar skyldur í demokratiska samfelagnum og hava møguleikan, viljan og evnini at átaka sær ábyrgd. Skam fái tann, sum hóttir ella háðar hesi ábyrgdarfólk.

B6 í perspektiv

Onkur hevur sett trupulleikarnar á B6 í samanhang við restina av Landssjúkrahúsinum. Tað er mikið gott, men er helst eitt lítið gagnligt perspektiv.

Landssjúkrahúsið í perspektiv

Signar P. Heinesen

Landssjúkrahúsið er aftur í andglettinum. Tað, sum er hent hesar seinastu dagarnar, opnar fyri eini gongdari leið – men opnar samstundis fyri eini fullkomuligari kaotiskari gongd, sum fleiri viðkomandi persónar hava sagt sínar viðkomandi meiningar um.

Allir partar, sum hava átikið sær leiðsluábyrgd – formliga ella ikki – hava ábyrgd av at finna ta gongdu leiðina og at ganga hana í praksis. Formliga leiðslan verður í hesum sambandi sett á ein royndarbonk, har bert tann búni stendur mát.

Var Landssjúkrahúsið ein stakur trupulleiki í føroyska almenna sektorinum, so var helst ikki so trupult at finna eina gongda leið.

Men so er ikki.

Aðrir trupulleikar í almenna sektorinum

Politikkarar eru gyrdir í brøkur av trupulleikum, sum vísa seg alla staðni í tí almenna sektorinum við nøkrum heilt fáum undantøkum. Vit skulu ikki minnast so langt aftur, so kunnu vit nevna Læraraskúlan, Almannastovuna, pensjónsmálið, Trøllanes-málið, Skúlan á Trøðni, Fólkaskúlan, Landsverkfrøðingin, Kunningardiskin í Vágum, Postverkið, telefonverkini, Strandferðsluna, innkrevjingardeildina hjá Toll- & Skattstovu landsins, tekniska skúla í Havn o.s.fr.

Og so alt tað, sum vit ongantíð hoyra beinleiðis, men sum fyri mong er lætt at lesa av, táið ein hoyrir eitthvørt frágreitt í fjølmiðlunum. Umframt alt tað, sum vit hoyra vinir og kenningar kæra sína neyð um.

Í øllum hesum meldrinum skulu starvsfólkini brúka stóran part av lívi sínum. Eini 6.000 í tali!

Væl tey flestu starvsfólkini velja at tiga. Av góðum grundum.

Nøkur fá starvsfólk kenna sínar skyldur í demokratiska samfelagnum og hava møguleikan, viljan og evnini at átaka sær ábyrgd. Skam fái tann, sum hóttir ella háðar hesi ábyrgdarfólk.

B6 í perspektiv

Onkur hevur sett trupulleikarnar á B6 í samanhang við restina av Landssjúkrahúsinum. Tað er mikið gott, men er helst eitt lítið gagnligt perspektiv.

Eitt annað perspektiv er at síggja B6 í samanhangi við tann almenna sektorin annars.

Kann tað vera, at sjúkrasystrarnar á B6 bera eini boð frá starvsfólkunum hjá tí almenna sektorinum yvirhøvur? Kann hetta vera eitt róp til føroyskar politikarar: »Skapa fortreytir fyri betri nyttu og størri effektiviteti!«? Kann tað vera, at tað serliga á B6 var, at har finst leiðsluorka hjá starvsfólkinum og ein makt, sum formliga leiðslan heilt einfalt ikki kundi síggja burtur frá, umframt at tíðin nú er búgvin til hetta málið – sum tilsamans gjørdi, at í hesum førinum bar ikki til at køva demokratisku krefturnar?

Sagt eitt sindur øðrvísi: Í einum demokrati ber ikki til við skili at seta seg so fast á formligu maktina, at aðrir partar á starvsøkinum kenna á sær, at tað, tey lata úr hondum, móti teirra vilja hevur ov vánaliga góðsku.

Eitt gagnligt perspektiv

Hetta perspektivið er gagnligt, tí tað er viðkomandi. Viðkomandi er tað, tí sjúkrasystrarnar á B6 hava brúkt leiðslumálburð. Tær hava ikki brúkt sjálvsøknan málburð.

Hetta perspektivið er gagnligt, tí tað kann loysa upp fyri tí itøkiliga málinum á Landssjúkrahúsinum.

Hetta perspektivið er gagnligt, tí tað setir ljóskastaran á ein trupulleika, sum liggur aftanfyri tann ítøkiliga trupulleikan á Landssjúkrahúsinum, men sum trupulleikarnir á Landssjúkrahúsinum eru ein partur av.

Hetta perspektivið er gagnligt, tí tað vísir á eina gøtu, sum føroyingar hava gingið í øldir og sum ger, at føroysk starvsfólk ikki standa aftanfyri nakran í effektiviteti.

Hetta perspektivið er gagnligt, tí tað vísir á eina gøtu, sum flestu lond í vesturheiminum royna at trakka, men sum er ring at ganga alla staðni. Hendan gøtan eitur 'strategisk atferð', sum er tað øvugta av 'atferð av royndum' – at alt skal roynast í nøkur ár, soleiðis at vit alla tíðina eru ov sein á sjóvarfallinum. Rákið skifti, áðrenn vit fluttu okkum. Vit krevja prógv fyri tí, sum var, heldur enn at skapa myndina av tí, vit vilja skal verða.

Hetta perspektivið er gagnligt, tí tað ber helst til at fáa ein samanhang millum trupulleikarnar á Landssjúkrahúsinum og trupulleikarnar á Læraraskúlanum, Almannastovuni, pensjónsmálinum, Trøllanes-málinum, Skúlanum á Trøðni, Fólkaskúlanum, Landsverkfrøðinginum, Kunningardiskinum í Vágum, Postverkinum, telefonverkunum, Strandferðsluni, innkrevjingardeildini hjá Toll-& Skattstovu landsins, tekniska skúla í Havn o.s.fr. – so ymiskir hesir trupulleikar annars tykjast vera.

Ikki minst er hetta perspektivið gagnligt, tí tað er teoretiskt og praktiskt møguligt at loysa trupulleikarnar við kendum og royndum arbeiðshættum. Um politisk megi verður løgd í spurningin, so ber til at venda eini óndari ringrás.

Ein vón

Tíðirnar eru serstakliga spennandi í hesum døgum. Tað vildi tí verið stórt spell, um hesir trupulleikar á brúnni gera, at týðandi møguleikar fara aftur við borðinum, samstundis sum vit brúka av tí hepna fonginum til at skava útyvir, har vit heldur áttu at bøtt um.

Tað er mín vón, at tey, sum taka sær av hesum ítøkiliga málinum, mega fáa eina hepna hond. Tað er eisini mín vón, at tað onkursvegna verður møguligt innan alt ov leingi at seta á tann veruliga trupulleikan í tí almenna sektorinum.

Góðar royndir aðrastaðni:

Klaksvíkar kommuna hevur tætt skúlasamstarv við vinarbýir sínar: Kópavog, Odense, Norrkøping, Trondheim, Østersund og Tampere.

Hesar kommunur umsita allar fólkaskúlar sínar, og tað er einki, ið bendir á, at kommunurnar ikki megna uppgávurnar á skúlaøkinum, heldur tvørturímóti. Vit hava sæð, at teirra fólkaskúli er á sera høgum støði og kunnu læra nógv av teimum, og tað er einki at ivast um, at tað hevði borið til at fingið mong góð ráðini frá teimum í einari yvirtøkustøðu.

Vónandi fer tað at eydnast landsstýrinum at finna eina skilagóða loysn, so kommunurnar kunnu yvirtaka fólkaskúlarnar skjótast gjørligt.

Viðmerking til innslag í Dag og Viku

Vit undirritaðu arbeiðstakarar, ið hava gjørt samstarvsavtalu við Strandfaraskip Landsins um koyring av Bygda-leiðum, vilja við hesum boða frá, at vit harmast stórliga um innslagið, sum var í Degi og Viku, hóskvøldið 3. januar 2002.

Í innslagnum hevði tíðindamaðurin samrøðu við ein av okkara bussførarum, ímeðan hesin koyrdi, og bakhurðin var blokerað av viðføri.

Vit gera vart við, at henda mannagongd kann seta trygdina í vanda og kann hetta tí undir ongum umstøðum góðtakast.

Gjørd verður ein eftirmeting av tilburðinum. Endamálið er at seta í verk tiltøk, sum hava við sær, at slíkt ikki endurtekur seg millum okkara bussførarar.

Heilsan
Andreas Poulsen,
Thorleif Isaksen,
Háns Jákup Kollslið,
Jóan Petur Langaard,
Poul Dánjal Poulsen,
Jens Petur Jensen.

Maskinmeistarar sáttmála við veitingarskip

SJÓVINNA
Tíðindaskriv

Um hálvgum trý tíðina leygarmorgunin skrivaðu Maskinmeistarafelagið og Reiðarafelagið fyri Farmaskip á fyrsta sinni undir sersáttmála fyri veitingarskip í frálandavinnu.

Frá 1. juni 2001 verður mánaðarlønin hjá maskinstjórum kr. 31.700 og hjá 1. meistarum kr. 27.289.

1. mars 2002 hækkar lønin hjá maskinstjórum til kr. 34.386 og hjá 1. meistarum til kr. 30.238.

Ein dreymur um 2002

Eg droymi um
eitt betri samfelag
eitt rættvísari samfelag
eitt meniskjaligari samfelag

Eg droymi um
eitt samfelag, sum hjálpir teimum neyðstøddu í heiminum
eitt samfelag, sum ger nakað veruligt fyri tey heimleysu í Føroyum
eitt samfelag, sum ger tað lættari at vera brekaður í Føroyum
eitt samfelag, sum ger tað tryggari at vera sjúkur í Føroyum
eitt samfelag, sum ger tað gott at gerast gamal í Føroyum

Eg droymi um
eitt gott samfelag fyri gomul
eitt gott samfelag fyri ung
eitt gott samfelag fyri sjúk
eitt gott samfelag fyri frísk
eitt gott samfelag fyri okkum øll

Eg droymi um
at Føroya fólk á løgtingsvalinum 2002, velur frælsi
at Føroya fólk á løgtingsvalinum 2002, velur rættvísi
at Føroya fólk á løgtingsvalinum 2002, velur menniskjaligheit
at Føroya fólk á løgtingsvalinum 2002, velur eitt stýri eftir vilja Guds

Gott nýggjár!

Álvur Kirke